## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin upp í hvassan vind av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum minus1 og +2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, seinnapartin nakað minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millm minus 2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitalagið millum minus 2 og +1 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum minus 2 og +2 stig.

# Framsýning og bókaframløga í Listaskálanum

**Fríggjadagin letur upp framsýning í Listaskálanum við málningum hjá Kára Svensson í sambandi við at savnið gevur út bók um listamannin**



*Málningur eftir Kára Svensson*

**FRAMSÝNING**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin 6. februar klokkan 17.00 hevur listamaðurin Kári Svennsson framsýning í Listaskálanum í Gundadali í sambandi við, at Listasavn Føroya gevur út bók um hann. Savnsleiðarin á Ribe Kunstmuseum, Dagmar Warming, cand.mag. MA, hevur skrivað bókina, sum telur 120 blaðsíður við teksti á føroyskum, enskum og donskum og við eini 70 myndum. Útgávudagin fæst bókin fyri serprís

### Kringlut menning

Um listamannin, sum er føddur í Havn í 1954, verður m.a. sagt í bókini: "Trupult er at fáa eitt neyðugt yvirlit, tá ið tú fæst við ein so virknan nútíðarlistamann sum Kára Svensson. Eitt yvirlit í bókstavligum týdningi, har verk hansara síggjast burturfrá við óheftum eygum og perspektiverandi sinni.

Listaverkini kunnu væl saktans lýsast í rættari tíðarrøð, um funnið verður fram til punktið, har ið Kári byrjar og síðan mennir seg til tann listamann, hann nú er. Men ein onnur menning ger eisini vart við seg; hon er ikki reglurøtt, men klingrut. Hon snýr seg um, at árstíðirnar fara í ring, og tað sæst týðiliga aftur í listaliga myndframburðinum – serliga tí ið viðvíkur litfjølini. Og nú hevur tú brádliga fingið fatur í okkurt týdningarmikið í myndaheimi Kára Svenssonar. Tú gerst eisini varugur við, at hansara list snýr seg ikki bara um náttúruíblástur, men ofta um eina stilla tilverudimensjón. Haraftrat kemur gleðin í tí at mála".

Dagmar Warming setir framsýningina, har listamaðurin verður til staðar á ferniseringini.

Lena Andersen og Niclas Johannesen luttaka við tónleiki.

Framsýningin endar 8. mars 2009.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -5 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | -2 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1032 hPa. yvir Grønlandi breiðir sig í landsynning.



**Í dag:**
Millum hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum og lágtrýstið við Lofoten rekur køld luft av landnyrðingi og norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/01 kl. 06[00] – 30/01 06[00]. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/02 kl. 06[00] – 02/02 06[00].
Avfallið higartil í februar: 0 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 23. januar | Mánin longst frá jørðini |
| 26. januar | Tendring |
| 2. februar | Fyrra kvarter |
| 7. februar | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. feb. | 0:09 | 12:48 | 11:48 | - | - | 12:03 | 2:09 | 14:48 | 3:09 | 15:48 | 11:03 | 23:43 | 10:03 | 22:43 | 0:24 | 13:03 | 1:24 | 14:03 | - | 12:33 | 1:09 | 13:48 |
| 4. feb. | 1:28 | 13:56 | 0:28 | 12:56 | 0:43 | 13:11 | 3:28 | 15:56 | 4:28 | 16:56 | - | 12:11 | 11:11 | 23:39 | 1:43 | 14:11 | 2:43 | 15:11 | 1:13 | 13:41 | 2:28 | 14:56 |
| 5. feb. | 2:24 | 14:53 | 1:24 | 13:53 | 1:39 | 14:08 | 4:24 | 16:53 | 5:24 | 17:53 | 0:39 | 13:08 | - | 12:08 | 2:39 | 15:08 | 3:39 | 16:08 | 2:09 | 14:38 | 3:24 | 15:53 |
| 6. feb. | 3:22 | 15:52 | 2:22 | 14:52 | 2:37 | 15:07 | 5:22 | 17:52 | 6:22 | 18:52 | 1:37 | 14:07 | 0:37 | 13:07 | 3:37 | 16:07 | 4:37 | 17:07 | 3:07 | 15:37 | 4:22 | 16:52 |
| 7. feb. | 4:22 | 16:50 | 3:22 | 15:50 | 3:37 | 16:05 | 6:22 | 18:50 | 7:22 | 19:50 | 2:37 | 15:05 | 1:37 | 14:05 | 4:37 | 17:05 | 5:37 | 18:05 | 4:07 | 16:35 | 5:22 | 17:50 |

